## OL fær av at vita

– Kanadisku OL-fyrireikararnir yvirhoyrdu atfinningar at sleðubreytini og lótu íðkararnar fara á hana, sigur pápi til georgiska sleðaran, Nodar Kumaritashvilli, sum var dripin fríggjadagin undir venjing. Pápin, David Kumaritashvilli, sum sjálvur er gamal sledari, vísir á, at fleiri undan OL hava funnist at, at breytin var ov skjót, samstundis sum hon tekniskt er torfør at gjøgnumføra. Eisini finst hann at, at bara kanadisku íðkararnir hava havt nóg góðar stundir til at vant á breytini.



## Mótmælisfólk tikin

Kanadiska politiið hevur skuldsett trý mótmælisfólk eftir anti-olympiska mótmælisátakið í Vancouver leygardagin. Ein 22 ára gamal amerikanari er skuldsettur fyri at bera eitt vandamikið vápn, meðan tvær kvinnur úr Vancouver, 18 og 23 ára gamlar, eru skuldsettar fyri harðskap ímóti tænastufólki. Mótmælisátakið hevði millum annað við sær, at fleiri handilsvindeygu og bilar í olympiska vertsbýnum fingu stóran skaða. Upprunaliga blivu sjey fólk handtikin í ófriðinum.

# Georgiskur OL-íðkari doyði undir venjing

**Georgiski bobsletuíðkarin, tann bert 21 ára gamli Nodar Kumaritashvili rendi á eina stálkonstruksjón við 150 km. ferð**

Nodar Kumaritashvili var slongdur út av bobsletuni, tá hann kom inn í síðsta svingið á bobsletubreytini í Whistler, Vancouver. Hann hevði tá eina ferð, sum var 150 km. um tíman. Sambært tíðindastovuni, Reuters rendi Nodar Kumaritashvili inn í eina stálkonstruksjón.

Síðsta svingið á bobsletubreytini er tiltikið vandamikið, og tað hellir 270 stig. Nodar Kumaritashvili rendi inn í báðar síðunnar av breytini, áðrenn hann var slongdir upp á ein kant.

Georgiski bobsletuíðkarin fekk beinavegin fyrstuhjálp, og ein tyrla var skjótt á staðnum. Men bert fáar minuttir seinni, var fráboðað, at Nodar Kumaritishvili var deyður.

- Hetta er ein syrgilig vanlukka fyri bæði familjuna hjá honum, og liðfelagarnar hjá honum, og hetta kemur at kasta ein skugga yvir setannarhátíðarhaldið, segði týski varaforsetin í altjóða olympisku nevndini, Thomas Bach.

Bobsletubreytin í Whistler, Vancouver verður roknað fyri at verða ein tann skjótasta í heiminum. Fleiri aðrir bobsletuíðkarar hava havt smærri óhapp. Millum tey sum hava havt eitt óhapp, er favoritturin til at vinna kappinga fyri einstaklingar, Armin Zöggler.

## VB-Tjaldur 22-31 (9-15):
# Tjaldur ájavnt Stjørnuni

**VB fekk ikki nakran møguleika at tryggja sær stig, tá Tjaldur í gjár vitjaði í útsettum dysti**




Jákup Mørk

Sigurin hjá Tjaldri ber við sær, at tær nú hava sama dystar- og stigatal sum Stjørnan, og enn sum áður halda tey bæði liðini fram í pararenningini ovast á stigatalvuni.

Tjaldur var á odda allan dystin á tamb sunnudagin. VB royndi í sínum lag at fylgja við, men tað var ikki, fyrr enn Tjaldur gearaði nakað niður eftir steðgin, at VB veruliga slapp upp í part.

Komandi vikuskifti skal VB til Runavíkar, áðrenn botnliðið skal í holt við avgerandi dystirnar móti teimm trimum liðunum, sum eru á plássunum frá nummar trý til fimm.

## FAKTA

**VB-Tjaldur 22-31 (9-15)**

**10 min:** 3-5
**20 min:** 7-9
**40 min:** 11-21
**50 min:** 16-24
**Málskjúttar**
**VB:** Migle Senvityte 8(5), Svava Vestergaard 5, Bára K. Mortensen 2, Sára Samuelsen 2, Una Egilsdóttir 2, Christina Holm 2, Monika Samuelsen1
**Tjaldur:** Adina Petrea 11, Cornelia Ribu 7, Heidi á Lakjuni 3, Kirstin Gaardbo 2, Mary-Ann Zachariassen 1, Jóhanna í Króki 1, Jacoba Langgaard 1
**Brotskøst:** VB 5
**Útvísingar:** VB 1, Tjaldur 1
**Dómarar:** Zeljko Jotic og Srdan Tomajek

### Máltindarnir, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 156 (10) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 109 (22) |
| Liljan Djurhuus | VÍF | 105 (31) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 96 (17) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 90 (15) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 82 (17) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 65 (18) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 57 0 |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 57 (3) |
| Fríðrún B. Danielsen | StÍF | 50 0 |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 50 0 |
| Una Egilsdóttir | VB | 49 (12) |
| Svava Vestergaard | VB | 47 0 |
| Bára Mortensen | VB | 46 0 |
| Rakul Augustinussen | Neistin | 46 (8) |



Alexandre Bilodeau gjørdsti tjóðarhetja í Kanada, tá hann í nátt vann gull í freestyle og skíð

# Søguligt kanadiskt OL-gull

**Loksins hevur Kanada vunnið eitt OL-gullheiðursmerki í Kanada**




Heri Simonsen

Tað kiksaði á summarleikunum í Montreal í 1976, og tað kiksaði eisini á vetrarleikunum í Calgary í 1988. Kanada var OL-vertstjóð, men hvørki í Montreal ella í Calgary eydnaðist tað Kanada at vinna OL-gull.

Tann 22 ára gamli, Alexandre Bilodeau gjørdist í nátt tjóðarhetja í Kanada, tá hann vann gull í frístíli innan skí.

- Eg haldi ikki, at eg havi fatað tað enn segði Alexandre Bilodeau. Hetta er ov gott til at verða satt. Vancouver fer at sova betri í nátt, tí nú er bannið hjá Kanada brotið, segði ein glaður Alexandre Bilodeau við altjóða fjølmiðlar aftaná gullbragdið.

Gullið kom eyka væl við, tí Jennifer Heil kiksaði innan júst somu grein hjá kvinnunum. Men tíbetur fyri vertstjóðina hevði Alexandre Bilodeau sína lívs framførslu. Og hann megnaði teinin innan bert 23,17 sekund, sum er 0,17 sekund betri enn vinnaratíðin á vetrarleikunum í Torino í 2006.

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 15 | 14 | - | 1 | 43 | 8 | 35 | 17 |
| 2 TB | 14 | 11 | - | 3 | 36 | 15 | 21 | 13 |
| 3 Mjølnir | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 21 | 14 | 12 |
| 4 Dráttur | 16 | 8 | - | 8 | 31 | 26 | 5 | 11 |
| 5 Fleyr | 15 | 8 | - | 7 | 29 | 25 | 4 | 9 |
| 6 ÍF | 16 | 2 | - | 14 | 7 | 43 | -36 | 2 |
| 7 KÍF | 15 | 0 | - | 15 | 2 | 45 | -43 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 15 | 12 | - | 3 | 38 | 15 | 23 | 17 |
| 2 SÍ | 15 | 11 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 16 |
| 3 Fleyr | 15 | 6 | - | 9 | 31 | 32 | -1 | 8 |
| 4 ÍF | 15 | 0 | - | 15 | 3 | 42 | -39 | 0 |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 15 | 13 | - | 1 | - | 1 | 440 | 298 | 142 | 27 |
| 2 Tjaldur | 15 | 13 | - | 1 | - | 1 | 454 | 332 | 122 | 27 |
| 3 Neistin | 15 | 8 | - | 0 | - | 7 | 394 | 372 | 22 | 16 |
| 4 VÍF | 15 | 4 | - | 0 | - | 11 | 355 | 425 | -70 | 8 |
| 5 StÍF | 15 | 4 | - | 0 | - | 11 | 357 | 446 | -89 | 8 |
| 6 VB | 15 | 2 | - | 0 | - | 13 | 320 | 447 | -127 | 4 |